# Politisk nýggjársrøða

**Jóannes Eidisgaard hevði væntað eina øðrvísi nýggjarsrøðu frá løgmanni hesa ferð. Hann fýlist millum annað á, at løgmaður gjørdist ov politiskur í sínari røðu, og at hann fór ov lætt um vinnuligu trupulleikarnar í føroyska samfelagnum**

NÝGGJÁRSRØÐA LØGMANS 2003
*Kristian Eli Andersen*



*Jóannes Eidisgaard heldur, at nýggjársrøða løgmans 2003 var ov politisk.*
*Mynd: Savnsmynd*

– Vit væntaðu øll eina øðrvísi nýggjársrøðu, men vit fingu eina røðu, sum løgmaður við vilja gjørdi eitt sindur politiska, og har hann bert tók tað fram, ið tænti sær sjálvum og Fólkaflokkinum best.

Jóannes Eidisgaard, formaður Javnaðarfloksins, hevði væntað at løgmaður orsakað av valstríðnum nýtti røðuna til at koma við einum nýggjársynski og heilsu til tjóðina í staðin fyri at gerast ov politiskur í sínari røðu.

### Ov lætt um

Jóannes Eidisgaard heldur eisini, at løgmaður í lýsing sína av búskaparligu og vinnuligi gongdini fór ov lætt um teir trupulleikar, ið millum annað síggjast í ali- og rækjuvinnuni.

– Løgmaður nevndi líka alivinnuna og rækjuvinnuna, men støðan er jú tann, at politiska skipanin ikki hevur rørt hond frá síðu um hesar báðar vinnur, ið hava verið í svárum trupulleikum nú í longri tíð. Mann hevur ikki havt boð uppá nakað sum helst, vísir Jóannes Eidisgaard á.

### Tók ikki ábyrgd

Viðvíkjandi samgonguslitinum og leiklutinum hjá løgmanni hesum viðvíkjandi, heldur Jóannes Eidisgaard, at løgmaður slapp sær ov lætt undan síni egnu ábyrgd og fekk tað at ljóða, sum um onnur høvdu skyldina av, at tann søguligi møguleikin, ið lá í nýggju yvirtøkuløgini fór fyri bakka.

– Løgmaður tosaði um spillandi tungur, sum sipaði beinleiðis til hatta málið, og sum ikki hoyrir heima í eini nýggjársrøðu, men annars er hatta samgongustríð eitt mál, sum teir báðir stóru samgonguflokkarnir sjálvir mugu keglast um, leggur Jóannes Eidisgaard tó afturat.

### Gloymdi jarðskjálvtan í Iran

Jóannes Eidisgaard beit merki í, at løgmaður nevndi kríggið í Irak, men at hann gloymdi at nevna jarðskjálvtan í Iran fyri fáum døgum síðani, har túsundtals fólk lógu eftirá.

– Nú løgmaður nevndi uttanríkisviðurskfti, so hevði tað sømt seg eisini at víst samkenslu fyri syrgiligu náttúruvanlukkuna í Iran og nevnt, at Føroya løgting átti at tikið spurningin upp um at veitt hjálp til Iran, so sum okkara grannalond hava gjørt, sigur formaður Javnaðarfloksins at enda.

Ikki bar til at fáa fatur á Høgna Hoydal, formanni Tjóðveldisfloksins, áðrenn blaðið fór til prentingar.

# Flestu skipini liggja um høgtíðina

**Tað ganga helst nakrir dagar, áðrenn verulig gongd kemur á aftur fiskaframleiðsluna á landi**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað fara nokk at ganga nakrir dagar, áðrenn verulig gongd kemur aftur á fiskaframleiðsluna á landi. Flestu ísfiskaskipini liggja vanliga um jóla-og nýggjárshalguna, og tað munnu flestu nótaskipini eisini gera. Hetta merkir, at tað gongur helst ein tíð, áðrenn boð verða send eftir arbeiðsfólkunum, sum arbeiða á fiskavirkjunum kring landið.

Á Havsbrún í Fuglafriði siga tey, at opið verður aftur sum vant frá mánadegnum, 5. januar.

Flestu av hinum virkjunum, sum keypa fisk undan Føroyum, verða opin aftur so skjótt, skipini koma innaftur at landa.

Seinastu dagarnar hevur veðrið verið óstøðugt. Tað hevur verið kalt og lýtt hvørt um annað.

Nýggjársaftan var illveður, men so hvørt, sum kvøldið leið, minkaði vindurin, og veðrið gjørdist betur.

Nýggjársdag var hampiligt veður og í gjár, fríggjadagin, 2. Januar, var fínasta veður.

Um viðrar komandi dagarnar, og fiskur verður at fáa, kann væntast, at tey fyrstu skipini gera ein stuttan túr.



*Um viðrar komandi dagarnar, og fiskur verður at fáa, kann væntast, at tey fyrstu skipini gera ein stuttan túr*

# Eingin serstøk røða

**– Eg haldi ikki, at har var nakað serstakt við hasari røðuni burtursæð frá, at løgmaður var keddur av at fara frá. Men tað skilji eg ikki. Tað er jú løgmaður sjálvur, ið hevur útskrivað nýval, sigur Lisbeth L. Petersen.**

NÝGGJÁRSRØÐA LØGMANS
*Kristian Eli Andersen*



*Forkvinna Sambandsfloksins er heldur fámælt viðvíkjandi nýggjársrøðu løgmans 2003*
*Mynd: Savnsmynd*

Forkvinna Sambandsfloksins hevur ikki nógvar viðmerkingar til nýggjársrøðu løgmans 2003. -Politiska støðan ger, at løgmaður hevur tað trupult við at halda hesa røðuna, tí hann fær ikki sagt nógv, og tað hevði eg heldur ikki væntað, vil Lisbeth L. Petesen vera við. Sambært henni er tað týðiligt, at løgmaður í røðuni var keddur av at fara frá, og tað hongur ikki heilt saman, heldur hon. Hon vísir á, at løgmaður sjálvur hevur skyldina av hesum.

### Saknaði okkurt

Lisbeth L. Petersen leggur tó dent, at hon saknar eina rámari útlegging av trupulleikunum í ali- og rækjuvinnuni. – Løgmaður brúkti millum annað røðuna til at vísa á, hvussu væl tað hevur gingist í føroyska samfelagnum seinasta árið, men tað er ikki heilt rætt. Vit hava jú havt stórar trupulleikar bæði í alivinnuni og í rækjuvinnuni, vísir hon á.

Lisbeth L. Petersen er heldur ikki samd við uppfatan løgmans av støðuni í almanna- og heilsuverkinum. – Eg eri ikki samd við løgmanni í, at tað, sum er hent har, er so fantastiskt, er seinasta viðmerking hennara.



# Jenis savnaði menningarhjálp

**Løgmaður var djarvur at nevna síni persónligu viðurskifti, men eg savnaði nøkur orð um menningarhjálp, segði Jenis av Rana um løgmansrøðuna**

LØGMANSRØÐAN
*Bartal Nolsøe Poulsen*



Jenis av Rana var sum heild væl nøgdur við allarhelst síðstu nýggjársrøðuna hjá Anfinn Kallsberg sum løgmanni.

– Eg lurtaði við áhuga eftir røðu løgmans, og eg haldi at hann kom gott frá henni. Eg haldi at tað var positivt at løgmaður tordi at koma inn á síni persónligu viðurskifti, segði Jenis av Rana, tá ið vit spurdu hann um viðmerkingar til røðu løgmans gamlaárskvøld. Jenis helt, at løgmaður kundi havt latið málið um sína fortíð ligið, men at hann valdi at gera viðmerkingar til tað var at fegnast um. – Deildar meiningar eru um málið millum manna, og fólk skulu hava loyvi til at halda tað, tey vilja, men eg eri fegin um at løgmaður tordi at nema við tað í røðu síni. Eitt annað mál, sum Jenis hefti seg við í røðu løgmans, var at hann gav rúm fyri teimum veiku í samfelagnum í røðuni, teimum við brekum. Tað fegnaðist hann yvir.

Jenis av Rana heldur at ein týdningarmikil partur av løgmansrøðuni var brotið um uttanríkispolitikk. Løgmaður tosaði bæði um kríggið í Irak, um stríðið ímóti yvirgangi og viðurskiftini millum Føroyar og ES. – Uttanríkispolitikkur er eitt evni, sum vit føroyingar gera alt ov lítið við. Vit eru ikki komin serliga langt á leið. Sjálvt grønlendingar eru um at taka okkum aftur, nú teir eru farnir at krevja meira ávirkan á síni viðurskifti við útheimin.

Jenis av Rana hevði ikki bert rósandi orð at bera løgmanni. Hann harmaðist um, at tað vóru onnur týðningarmikil mál, sum løgmaður ikki røddi um, mál sum sambært Jenis møguliga eru ov eym. – Serliga hugsi eg um menningarhjálp til útheimin, og um neyðina í Iran í hesum døgum. Vit føroyingar áttu sjálvandi at reagera uppá ein tílíkan sorgarleik. Møguliga skammaðist løgmaður at nevna tað, og eg skilji hann væl, tí at vit hava alla orsøk til at skammast, segði Jenis millum annað. Hann helt avgjørt, at menningarhjálp fór at vera eitt av evnunum, sum Miðflokkurin fór at taka upp í møguligum samgongusamráðingum eftir valið 20. januar. – Vit kunnu ikki sita í hesum paradísinum, sum Føroyar jú eru, og lata eyguni aftur fyri tí, sum fyriferst úti í heimi. Vit eiga sum samfelag at vera til reiðar at rætta eina bróðurhond, tá ið slíkar vanlukkur henda.

# Realistisk og kensluborin røða

**Kári P. Højgaard, formaður Sjálvstýrisfloksins, heldur at løgmaður helt eina megnarrøðu mikukvøldið. – Tað var ein góð og kensluborin røða, ið bar brá av, at valið er í nánd.**

LØGMANSRØÐAN
*Bartal Nolsøe Poulsen*



Røða løgmans greiðir fyrst og fremst frá tí, sum samgongan hevur staðið fyri hesu seinastu árini. Hon tekur ikki bara samanum árið, sum fór, men heldur alt skeiðið hjá Anfinni Kallsberg sum løgmaður, heldur Kári P. Højgaard. – Tað var ein realistisk røða, ið vísti veruleikan sum hann er, nevniliga at hóast stóran framburð síðstu árini eru nøkur skýggj at hóma á luftini.

– Tað er týdningarmikið, at føroyingar vita, hvussu landið liggur, sigur formaður Sjálvstýrisfloksins. Trupulleikar eru í pørtum av fiskiflotanum, rækjuvinnan er illa sperd av lágum prísum, og eg eri glaður fyri at løgmaður kom inn á hesi viðurskifti. Røðan segði sum er, at tað kann ganga skjótt hvønn vegin. Men hóast røðan var realistisk, so var hon eisini til tíðir kensluborin. Løgmaður nam við mentunarliga arvin hjá okkum við at endurgeva nakrar av mætu yrkjarum okkara, hann røddi um ítróttarlig og tónlistarlig avrik hjá føroyingum í 2003, og hetta er nakað, sum talar til kenslurnar hjá fólki.

Kári P. Højgaard helt eisini, at røðan bar brá av at val stendur fyri durunum. – At løgmaður nevnir møguleikan fyri undirsjóartunlum til Sandoynna og Suðuroynna avspeglar, at val er í nánd. Men Kári ásannar at stórur aktivitetur hevur verið á samferðsluøkinum seinastu tíðina. – Tað verður í ár, at nýggi Smyril kemur, og at nýggj samferðsluhavn verður gjørd á Drelnesi. Kári P. Højgaard fegnaðist eins og fleiri av hinum formonnunum yvir, at løgmaður nevndi tey brekaðu í samfelagnum í røðuni.

– Av viðurskiftum uttanlanda nevnir løgmaður hendingar, sum hava skakað heimin, bæði góðar og ringar. Hendingin í summar í Svøríki, tá ið svenski uttanríkisráðharrin varð dripin, og handtøkuna av Saddam Hussein í Irak, og tað er júst tílíkt, sum løgmansrøðan eigur at snúgva seg um, heldur Kári P. Højgaard.

– Løgmaður ger í røðuni upp við tað gamla, og tað merkist líkasum, at vit standa á gáttini til nakað nýtt. Eitt nýtt ár, og ein nýggjan politiskan veruleika eftir 20. januar. Samanumtikið er røðan konstruktiv, kensluborin men samstundis realistisk, og ikki merkt av háfloygdum flosklum. Um vit lyfta byrðarnar í felag, er vón fyri framman, sigur Kári P. Højgaard at enda.